# Páll Fangi kløkkaði seg sjálvan



*Páll Fangi vann í harðari kapping við Tvørabátin*

Mynd: Jens Kristian Vang

**6-MANNAFØR MENN** Meistararnir av Tvøroyri og Riddarin úr Miðvági bjóðaðu av, men klaksvíkingar vóru drúgvastir á vánni í Klaksvík

Tróndur Arge

Móttøka fyri Klaksvíkingi. Tað eru seinastu orðini, sum eru skrivað á heimasíðuni hjá Klaksvíkar Róðrarfelag. Móttøkan var leygardagin 1. august í fjør. Tá varð tosað um, at í 2010 skuldi arbeiðast fyri, at Klaksvíkingur fyri fyrstu ferð síðani 1970 skuldi vinna kappingina millum 10-mannaførini.

Norðoyastevnan er av fyri í ár, og Klaksvíkingur hevur framvegis ikki vunnið í heimasjógvi síðani 1970. Tað eydnaðist ikki at manna 10-mannafarið, og eitt skifti sá tað einki út fyri, at tað skuldi eydnast at manna nakran bát í Klaksvík.

Seks vikur undan Norðoyastevnu eydnaðist tað at manna Páll Fanga. Nakrir av teimum, sum í fjør vunnu FM við Klaksvíkingi, eru nú umborð á 6-mannafarinum. Teir roknaðu ikki við at vinna longu nú, men teir søgdu seg vóna at hava møguleika at arga hinar eina ferð seinni í summar.

Sjálvandi fegnaðust viðhaldsfólkini í Klaksvík og Norðoyggjum, og tað var einki at siga til, at manningin var ovurfegin eftir sigurin. Bæði tí teir ikki høvdu roknað við tí, og tí talan var um sera tætta og dramatiska kapping.

Páll Fangi leyp avstað soleiðis, sum Klaksvíkingur ofta gjørdi tað í fjør, og eina løtu tóktist tað sum um, at talan skuldi gerast um sannførandi sigur.

Páll Fangi vann, men tað var sera spennandi og skiftandi og harvið dramatiskt. Undir liðini á Páll Fanga lá Tvørabáturin, sum bjóðaði av, og undir landinum eystaru megin vísti Riddarin seg at vera sera boysin, eftir at hann ikki hevði fingið nakað serligan start.

Fram við áskoðarafjøldini á Kósabrúnni og vestaru megin var kappingin ógvuliga tøtt. Allir hesir tríggir bátarnir royndu seg sum fremsta bát, men í endaspurtinum vísti Páll Fangi seg at vera tann drúgvasti. Páll Fangi var lítlan skutin undan Tvørabátinum, sum aftur var eina stóra hálva bátslongd frammanfyri Riddaran. Hinir bátarnir vóru væl aftari.

trondur@sosialurin.fo

**6 MANNAFØR** MENN

| | | |
|---|---|---|
| 1 | **Páll Fangi** | **07:44.02** |
| 2 | Tvørabáturin | 07:45.12 |
| 3 | Riddarin | 07:47.08 |
| 4 | Smyril | 07:57.14 |
| 5 | Strálan | 07:58.05 |
| 6 | Skúgvur | 08:01.10 |
| 7 | Hósvíkingur | 08:08.13 |
| 8 | Lómur | 08:17.02 |
| 9 | Jarnbardur | 08:21.07 |
| 10 | Gongurólvur | 09:02.01 |

# Sølmundur søguligan sigur

**6-MANNAFØR KVINNUR** Sigurin á Norðoyastevnu var tann fyrsti nakrantíð hjá Sølmundi við kvinnumanning

Tróndur Arge

Søga varð skrivað, tá ið Sølmundur við kvinnumanning vann kappingina millum 6-mannafør við kvinnum á Norðoyastevnu.

Jarnbardur hevur seinasta árini verið suverenur í hesi kappingini, og tá ið Jarnbardur ikki hevur tikið lut, so hava Gongurólvur, Riddarin og Páll Fangi vunnið sigrarnar. Tað hevur so at siga ikki verið pláss fyri Sølmundi millum teir fremstu, men hesa ferð eydnaðist tað. Fyri fyrstu ferð nakrantíð vann Sølmundur við kvinnumanning.

Tað var leingi tætt og spennandi. Hvessingur, sum lá eystarlaga í feltinum, og Sølmundur, sum var vestari á, fingu besta startin, og mest sum allan teinin stóð kappingin millum hesar báðar bátarnar. Í endaspurtinum var tó eingin ivi. Sølmundur hevði meiri orku og fór Sølmundur frá næsta kappingarneytanum.

Munurin var ein bátslongd, og tí er tað ikki óhugsandi, at tað kanska fer at verða uppaftur meiri spennandi, tá ið Hvessingur leygardagin fer at rógva í heimasjógvi á Sundalagsstevnuni í Hvalvík. Næsta kappingin eftir ta kappingina verður á Eystanstevnu, tá ið Sølmundur fer at rógva í heimasjógvi á Skálafjørðinum.

trondur@sosialurin.fo

**6 MANNAFØR** KVINNUR

| | | |
|---|---|---|
| 1 | **Sølmundur** | **05:27.12** |
| 2 | Hvessingur | 05:30.00 |
| 3 | Riddarin | 05:31.12 |
| 4 | Gongurólvur | 05:35.01 |
| 5 | Lómur | 05:47.06 |
| 6 | Jarnbardur | 06:05.14 |

# Kvívíkingur er vaknaður

**8-MANNAFØR** Avrikið á Norðoyastevnu var so mikið sannførandi, at kvívíkingar mugu roknast sum besta boðið upp á fyrsta FM heitið síðani 2002



*Sannførandi Kvívíkingur vann greitt á Argjabátinum*

Mynd: Jens Kristian Vang

Tróndur Arge

Kvívíkingur vann kappingina millum 8-mannaførini á Norðoyastevnu, og avrikið og úrslitið vóru so mikið góð, at kvívíkingar fara at liggja í miðjuni, tá ið tað komandi leygardag aftur verður FM kappróður á skránni.

Saman við Argjabátinum og Árnfirðingi fekk Kvívíkingur besta startin, og eina løtu var tætt millum hesar tríggjar bátarnar. Men so fór Kvívíkingurin rættuliga at røra upp á seg. Hann tók seg meiri enn eina bátslongd frá Argjabátinum, meðan Árnfirðingurin dragnaði, og í endaspurtinum var eingin ivi. Kvívíkingur var meiri enn eina bátslongd frammanfyri Argjabátin, sum í fjør vann allar róðrarnar og harvið var FM vinnari í 2009.

Nú eru fleiri ár síðani, at Kvívíkingur var í yvirskriftunum, men tað var tann tíð, tá ið kvívíkingar settu dagsskránna í kappingini millum 8-mannaførini. Avrikini hava eisini borið góð úrslit við sær, og hæddarpunktið var, tá ið Kvívíkingur vann FM í 1978, 1979, 1980 og 1981. Síðani hevur Kvívíkingur vunnið tvey FM – í 1996 og 2002.

Seinastu sjey árini hevur Kvívíkingur ikki verið í nánd av FM heitinum, og serliga trý tey seinastu árini hevur tað verið rættuliga friðarligt. Í fjør luttók Kvívíkingur ikki, í 2008 var Kvívíkingur nummar fýra í øllum róðrunum, í 2007 luttók Kvívíkingur ikki, og í 2006 var einasta luttøkan á Fjarðastevnuni, tá ið Kvívíkingur endaði á fimta plássi.

Í 2005 var Kvívíkingur væl við, men tað eydnaðist ikki at vinna nakran róður. Kvívíkingur var nummar tvey í øllum róðrunum. Í 2004 og 2003 gekk tað hampuligt, og tá vóru tað serliga sigrarnir á Ólavsøku, sum gjørdu, at avrikini vóru góðtikin.

FM heitið í 2002 varð vunnið við fýra sigrum. Ta ferðina var Kvívíkingur næstfremstur á Norðoyastevnu. Nýggja kappróðrarárið byrjaði við sannførandi sigri í Klaksvík, og alt bendir á, at Kvívíkingur fer at vera við til at seta dagsskránna í summar. Avrikini hjá hinum á Norðoyastevnu benda á, at í løtuni er tað bara Argjabáturin, sum møguliga verður førur fyri at bjóða av. Árnfirðingurin, Friggjarin, Ørvur og Knørrur skulu gera heilt nógv við tað, um teir á nakran hátt skulu hava nakran møguleika at hótta Kvívíking, sum longu nú má roknast at vera upplagdur favorittur. Kvívíkingur er vaknaður úr FM dvalanum, sum hann seinastu sjey árini hevur verið í!

**8 MANNAFØR**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | **Kvívíkingur** | **07:22.09** |
| 2 | Argjabáturin | 07:25.14 |
| 3 | Árnfirðingur | 07:35.05 |
| 4 | Friggjarin | 07:39.00 |
| 5 | Ørvur | 07:40.15 |
| 6 | Knørrur | 07:59.13 |